

**VITJANIR**

*– Festivalurin dregur eina rúgvu av fólki til býin, sum ongantíð høvdu vitjað her annars, staðfestir Gunvá við Keldu, borgarstjóri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Gunvá við Keldu saman við borgarstjóranum í Kópavági, sum er vinarbýur Klaksvíkar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Vit hvíla ikki í úrslitunum

**Gunvá við Keldu er borgarstjóri í Klaksvík. Hon sigur, at Summarfestivalurin er ein upplagdur møguleiki hjá kommununi at gera vart við seg**

Uni Holm Johannesen

– Vit skulu syrgja fyri ikki at hvíla í okkara úrslitum. Tað er umráðandi, at kommunan áhaldandi hugsar nýtt, sigur Gunvá við Keldu, meðan hon varisliga tekur um hvíta kaffikoppin.

Á sínari skrivstovu í býráðshúsinum í Klaksvík situr borgarstjórin. Frá vindeyganum hevur hon frítt útsýnið yvir fiskibýin, sum hevur staðið í stað seinastu árini. Men kommunan er farin undir drúgvu tøkini at venda skútuni. Og ein týdningarmikil liður í royndini er Summarfestivalurin, sum væntandi fer at hýsa gott og væl 10.000 festivalgestum um vikuskiftið.

Summarfestivalurin hevur verið í støðugari menning, síðan hann fór av bakkastokki í 2004. Men borgarstjórin slær fast, at tað skal framhaldandi verða áhugavert at vitja á festivalinum í Klaksvík.

– Tað sigur seg sjálvt, at fólk vilja ikki gjalda fleiri hundrað krónur fyri somu upplivingar í fleiri ár. Tí er uppgávan at endurnýggja tiltakið fyri hvørt ár, uttan at spæla av við upprunaligu ætlanina við festivalinum. Og tað hevur hilnast væl higartil, sigur Gunvá við Keldu.

## Lítla ávirkan

Borgarstjórin í Klaksvík fjalir á ongan hátt gleðina, at festivalurin verður lagdur til rættis, uttan stórvegis hjálp frá kommuni.

Fyrireikararnir av festivalinum eru íverksetarar, sum hava samskipanina undir hond. Uppgávan hjá kommununi er at veita stuðul við at rudda upp og annað.

Gunvá við Keldu frøist, tí Summarfestivalurin gevur fólki íblástur, umframt at býurin fær nógva umrøðu.

– Vit royna at lofta hendingini og hava ymisk tiltøk uttan fyri festivaløkið. Finalan um Løgmanssteypið verður eisini spæld í Klaksvík í ár, og tað gleða vit okkum til. Fyri kommununa eru festivaldagarnir ein upplagdur møguleiki at gera vart við seg, sigur borgarstjórin í Klaksvík.

Millum tiltøkini eru listaframsýningar og fótbóltsland.

## Mist eina rúgvu

Tað eru dømi um, at havnarmenn rýma undan ólavsøkuni, og gøtufólk renna undan G!-festivalinum, viðhvørt, tí tey vilja hava frið.

Klaksvíkingar eru ikki troyttir av Summarfestivalinum, sambært Gunvá við Keldu.

Festivalurin er í miðbýnum, har eingi sethús eru, og tí verða íbúgvararnir ikki ávirkaðir stórvegis av larmi.

Borgarstjórin leggur eisini klaksvíkingum eina við, at kommunan fær ikki verði Summarfestivalinum fyriuttan.

– Festivalurin dregur eina rúgvu av fólki til býin, sum ongantíð høvdu vitjað her annars, staðfestir Gunvá við Keldu, borgarstjóri.

uni@sosialurin.fo